# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Lagt er upp til brak í fjórðingsfinalu

**Sjey av teimum átta fjórðingsfinaluliðunum eru nú funnin. Lagt er upp til nakrar spennandi fjórðingsfinalur, har eitt nú Portugal og Týskland bresta saman**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinnus*
*patur@sosialurin.fo*



*Svenski málmunurin er somikið góður, at teir standa seg við javnleiki, tá teir í kvøld spæla móti Russlandi*

Gleðis- og sorgartár hava longu verið at síggja, nú bara eitt umfar í einum bólki er eftir at leika. Størsta vónbrotið liggur uttan iva í Fraklandi, har landslið teirra endaði aftast í bólki C. Hóast spádómar ikki hava spátt annað, so er tað fyri heimaáskoðararnar eisini eitt vónbrot, at Sveis og Eysturríki ikki komu víðari. Bæði liðini høvdu nógvar góðar fótbóltsligar løtur, men tá ið kom til stykkis, var hvørki av vertslondunum góð nokk.

## Russland ella Svøríki?

Sjey av átta fjórðingsfinaluliðum eru longu funnin. Ein bólkur vantar framvegis at avgerast, og her spurningurin, hvør tryggjar sær áttanda og seinasta atgongumerkið til fjórðingsfinaluna. Kappingin er ímillum Russland og Svøríki, sum bæði hava trý stig í bólki D. Júst hesi lið hittast í Innsbrück kl.19.45 í kvøld, og vinnarin hevur tryggjað sær forkunnuga plássið í EM-fjórðingsfinaluni. Svøríki hevur fyrimunin við einari málúrtøku, ið er trý mál betri enn tann Russiska. Hetta førir við sær, at Svøríki kann sleppa víðari við javnleiki.

Bæði liðini tykjast at vera klár til henda sera týdningarmikla dystin. Bilyaletdinov, Zhirkov og Torbinski hava allir vera ivasamir fyri Russland, men allir væntast at gerast klárir til dystin. Einasti leikari, sum við vissu ikki verður við, er svenski Christian Wilhelmsson. Harafturat eru Zlatan Ibrahimovic og Niklas Alexandersson ivasamir.

## Fjórðingsfinalubrak

Tvey av luttakandi londunum, sum helst hava borðreitt við besta fótbóltinum higartil, bresta saman í einari fjórðingsfinalu. Hetta er stórdysturin millum Portugal og Týskland, sum verður leiktur á St. Jakob-Park í Basel hóskvøldið. Megnar Ronaldo at ganga ígjøgnum veiku týsku verjuna, ella fara týskarar við Ballack á odda at berja seg víðari til hálvfinaluna? Hetta verður sera áhugavert at fylgja við í, men framvegis manglar eitt lið til at manna fjórðingsfinalurnar. Og tað liðið verður altso funnið í kvøld klokkan 19.45.

## EM-dystir

**Frakland-Italia 0-2 (0-1)**
**0-1:** Andrea Pirlo (br.), 25.
**0-2:** Daniele De Rossi, 62.

**Holland-Rumenia 2-0 (0-0)**
**1-0:** Klaas-Jan Huntelaar, 54.
**2-0:** Robin Van Persie, 87.

**Komandi dystir**
**Bólkur D**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 18.06 | 19.45 | Russland-Svøríki |
| 18.06 | 19.45 | Grikkaland-Spania |

**Fjórðingsfinalurnar:**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 19.06 | 19.45 | Portugal-Týskland |
| 20.06 | 19.45 | Kroatia-Turkaland |
| 21.06 | 19.45 | Holland-Russland/Svøríki |
| 22.06 | 19.45 | Spania-Italia |

## Nólsoyingurin og Ormurin Langi eru við

**Fýra 10-mannafør verða við, tá kapproðurin á jóansøku verður skotin ígongd**

Triðja FM-stevnan verður um vikuskiftið. Jóansøkan verður í ár í Vági, Róðrarsambandið hevur nú boðað frá, hvussu bátarnir liggja til kapproðurin. Plássini eru sum vant sett eftir, hvussu bátarnir stóðu seg á seinastu FM-stevnuni. Til 10-mannafarsróðurin verða hesa ferð tveir »Ormar”. Ormurin er nýggi báturin hjá Knørri, meðan Ormurin Langi er báturin hjá vágbingum.

**Barnaróður, dreingir**

| | |
|---|---|
| 5 | Blikur |
| 6 | Frúgvin |
| 7 | Spógvin |
| 8 | Jallurin |
| 9 | Teistin |
| 10 | Junkarin |
| 11 | Títlingur |
| 12 | Havfrúgvin |

**Barnaróður, gentur**

| | |
|---|---|
| 4 | Falkur |
| 5 | Spógvin |
| 6 | Tjaldrið |
| 7 | Teistin |
| 8 | Ørnin |
| 9 | Frúgvin |
| 10 | ítlingur |
| 11 | Hvassi |
| 12 | Blikur |
| 13 | Kollur |
| 14 | Junkarin |

**5-mannafør, gentur**

| | |
|---|---|
| 6 | Blikur (0) |
| 7 | Jallurin |
| 8 | Hvassi |
| 9 | Drekin |
| 10 | Junkarin |
| 11 | Firvaldur |
| 12 | Tambar |

**6-mannafør, kvinnur**

| | |
|---|---|
| 8 | Jarnbardur |
| 9 | Gongurólvur |
| 10 | Lómur (G) |

**5-mannafør kvinnur**

| | |
|---|---|
| 5 | Havfrúgvin |
| 6 | Katla |
| 7 | Ritan |
| 8 | Frúgvin |
| 9 | Sílið |
| 10 | Erla Kongsdóttir |
| 11 | Teistin |
| 12 | Báran |
| 13 | Blikur |

**6-mannafør menn**

| | |
|---|---|
| 5 | Víkingur |
| 6 | Rádni |
| 7 | Gongurólvur |
| 8 | Tvørábáturin |
| 9 | Sundabáturin |
| 10 | Riddarin |
| 11 | Lómur |
| 12 | Jarnbardur |
| 13 | Fortuna |

**8-mannafør**

| | |
|---|---|
| 7 | Kvívíkingur |
| 8 | Argjabáturin |
| 9 | Heiðabáturin |
| 10 | Árnfirðingur |
| 11 | Knørrur |

**10-mannafør**

| | |
|---|---|
| 7 | Nólsoyingur |
| 8 | Ormurin |
| 9 | Havnarbáturin |
| 10 | Ormurin Langi |